

*Um 60 fólk vóru samankomin í skúlanum á Kambsdali, tá norðurlendsk mál vórðu sett í fokus*
*Mynd: Jóhan Heri Joensen*

# Norðurlendsk mál í fokus

**Í samband við Nordvesten-tiltakið, vórðu norðurlendsk mál sett í fokus á ráðstevnu í skúlanum á Kambsdali. Á málráðstevnuni varð spurt, hvussu við varðveita norðurlendsku málini, og hvussu vit laga málið til nýggju tíðirnar**

NORDVESTEN
*Rúna Sivertsen*

Í øllum norðanlondum er eitt týdningarmikið kjak um ávirkanina av øðrum málum, serstakliga enskum.

Norðurlendsku máløkini eru uppá seg smá, meðan stóra heimsmálið, enskt, ræður á nógvum økjum.

Luttakararnir í panelinum í skúlanum á Kambsdali í farnu viku, vóru úr Føroyum, Íslandi og Noregi, sum øll høvdu innlegg til evnið.

Kjakið, sum sjálvsagt var ætlað á eini slíkari ráðstevnu, mátti lúta fyri klokkuni. Dúgvan var nógv seinkað henda dagin, og tí byrjaði ráðstevnan ikki fyrrenn langt eftir ásettu tíðina.

### Mál er annað enn "snakk"

Úr Noregi vóru tað Albert Einarsson og Endre Brunstad, ið høvdu orðið.

Albert Einarsson er seniorráðgevi hjá VOX, sum er ein altjóða miðdepil fyri innlæring hjá vaksnum. Í innleggi sínum, sum hann kallaði, "Mál er ikki bara at tosa", vísti hann fram eitt telduforrit, ið nýtt verður til innflytarar, sum skulu læra norskt.

Endre Brunstad er dr.art. í norðurlendskum máli og arbeiðir á Nordisk Institutt á universitetinum í Bergen. Hann er knýttur at granskingarætlanini, "Den nye norsken", sum kannar sambandið millum norskt og onnur mál, serstakliga enskt.

Í innleggi sínum viðgjørdi hann serliga purismu. Hann samanbar máløkini og viðgjørdi fyrimunir og vansar við málreinskan.

Hann vísti á, at vansarnir við reinskan eru fleiri, eitt nú gerast fólk ótrygg um egið málbrúk, og band verður lagt á málsligu skapanarevnini.



*Ikki allir luttakararnir á ráðstevnuni hildu evnið vera serliga áhugavert. Lítli Glenn úr Grønlandi fær sær ein lúr, meðan tosað verður um purismu, normativismu og importorð*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

### Bei ella bless

Úr Íslandi kom Kristján Árnason, professari við Háskóla Íslands. Hann tosaði um normativismu og purismu, sum hevur eyðkent íslendingar í teirra hugburði til móðurmálið.

Longu í Snorra Edda og teimum grammatisku ritgerðunum finnast viðmerkingar um rætt og skeivt málbrúk. Rætta málbrúkið var at finna hjá yrkjarunum. Síðani tá hava íslendingar havt tað klassiska fornsøgu- og yrkjaramálið sum fyrimynd.

Nú á døgum leggja vit dent á at varðveita málið heilt aftur til upprunan, men spurningurin er, hvussu leingi hetta er sannlíkt og praktiskt gjørligt. Ber til at nýta eitt miðaldarmál og framvegis halda tað reint, var ein av spurningunum, ið Kristján setti fram.

Hann vísti á, at meðan farvælheilsanin, "bei", ikki verður góðtikin sum íslendskt, verður "bless" roknað sum seríslendsk. Men veruleikin er, at bless eins væl og bei hevur sín uppruna enskum.



*Millum tónleikainnsløgini, sum eisini vóru á skránni, spældi evnaríki unglingin, Jóhan Hentze*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

### It's only words

Jógvan í Lon og Jóhan Hendrik Winter Poulsen umboðaðu Føroyar á málráðstevnuni.

Jógvan í Lon kallaði sín fyrilestur, "Holdning til engelsk importord i Norden". Fyrilesturin bygdi á úrslit av meiningakanningum, sum vórðu gjørdar í málunum í Norðanlondum í 2002.

Hendan meiningakanning var ein partur av eini størri málhugburðsætlan, sum fer fram í løtuni við heitinum, "Moderne importord i sprogene i Norden".

Stórt spell, at mest spennandi parturin av fyrilestrinum hjá Jógvani í Lon, nevniliga samanberingin av úrslitunum úr Noregi, Íslandi og Føroyum, lá eftir, tí tíðin gekk undan.

Jógvan endaði sín fyrilestur skemtiliga við at spæla eitt brot úr sanginum hjá bólkinum, Bee Gees, "It's only words".

### Við hjólhesti av Velbastað

Tá Jóhan Hendrik Winther Poulsen fekk orðið, var so lítil tíð eftir, at hann mátti lesa sum til marathon. Men tað gjørdi ikki mun hjá professaranum, sum hevði súklað allan vegin av Velbastað heilt inn á Kambsdal henda morgun.

Jóhan Hendrik tosaði um eitt felags norðurlendskt talumál. Hann segði, at einaferð í "gráu" fortíðini hava norðbúgvar helst tosað eitt felags lættskilt mál. Men við tíðini er hendur ein skilnaður, sum endaði við ymisku norðurlendsku málunum.

Hann vísti á, at føroyingar við síni klassisku lesiúttalu av danska málinum, hava heldur lættari við at gera seg skilligar fyri flestu norðbúgvum.

Hann segði eisini, at "gøtudanskt" er einasti máti at syngja kvæðini uppá. Nýggju krøvini í skúlanum um "normala" úttalu av danska málinum, ganga út yvir rættskrivingina, og ger málið fremmant mótvegis hinum norðurlendsku málunum.

At SvF ger danskan tekst til norðurlendskar filmar, metir Jóhan Hendrik hevur eina negativa ávirkan, tá ræður um at skilja hesi mál.

Professarin heldur, at serskilta føroyska úttalan av donskum er ein mentanararvur, sum átti at verðið varðveittur saman við nútímans úttaluni.

# ítróttur

Nr. 129 • fríggjadagur • 11. juli 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

FS Vágar - HB 2-3 (0-1):

## Vágamaður søkti sínar egnu

**Tór-Ingar Akselsen skoraði sigursmálið ímóti sínum fyrrverandi liðfeløgum, tá FS Vágar og HB brustu saman í einum sera spennandi og málríkum dysti**

1. DEILD
*Stefan í Skorini*



*Vágamaðurin í HB, Tór-Ingar Akselsen, fekk sigursmálið móti endanum av dystinum móti FS Vágum, tá hann sendi eitt fríspark beinleiðis í netið. Ein perla av einum máli í Miðvági*
*Savnsmynd*

HB dró longra stráið ímóti FS Vágum í einum sonnum gysara í Miðvági mikukvøldið, og annan dystin á rað megnaði HB at hála trý stig í land, hóast havnarmenn lógu undir stórum trýsti frá mótstøðuliðnum.

Tað var útiliðið, sum fekk betri byrjan og legði seg framum heilt tíðliga í dystinum. FS Vágar misti bóltin á miðvøllinum, og Rúni Nolsøe sendi Bjarna Jørgensen avstað í høgru. Hann rak inn í brotsteigin, har hann var leysur við málverjanum, og hann skoraði sítt fyrsta landskappingarmál í ár við at senda bóltin ímillum beinini hjá Jákupi Joensen til 1-0.

HB spældi betur fyri steðgin, og móti endanum av fyrra umfari hevði útiliðið tamarhald á støðuni og legði trýst á heimaliðið.

Tað var eitt broytt HB-lið, sum kom til Vágarnar. Fleiri leikarar sótu uttanfyri við skaða og leikbanni. Hetta hevði við sær, at Eli Thorsteinsson var fluttur fram á miðvøllin, og Jan Dam fekk sín fyrsta dyst frá byrjan í verjuni.

Bjarni Jørgensen var við frá byrjan í álopinum saman við Tór-Ingari Akselsen og Rógva Jacobsen í eini 4-3-3 uppstilling. Tó var Nicu Dogaru aftur at síggja á miðvøllinum, eftir at hann leingi hevur sitið uttanfyri.

### FS Vágar ger bart

Men í seinna hálvleiki broyttist alt. FS Vágar hevði nú lotið í ryggin og legði stórt trýst á HB-verjuna. Spælið bleiv nú alt meira flutt oman á HB-hálvuna, og hetta gav úrslit nakað inn í seinna hálvleik.

FS Vágar vann eitt fríspark úti í høgra borði, sum leikandi venjarin Jens Erik Rasmussen legði innfyri. Har var tann mjávaksni brasilianarin Clayton Soares hægstur og javnaði fyri FS Vágar.

Hóast vágamenn høvdu javnað, hildu teir fram við sínum atsóknum móti HB-málinum. Tá seinni hálvleikur var meira enn hálvrunnin, fekk FS Vágar seinna málið.

Bjarni Prior sendi ein langan bólt úr høgru til Jens Erik, sum rann ígjøgnum verjuna í vinstra borði. Jens Erik tamdi bóltin og legði innfyri til Kim Poulsen, ið stóð púra leysur beint frammanfyri málinum, og hann hevði lætt við at leggja heimaliðið framum. Eitt sera vakurt mál, og rómur og fagnaður var nú um vøllin í Miðvági.

### Deyðbóltar bjargaðu HB

Gleðin hjá heimaáskoðarunum var tó stokkut, tí HB hevði ikki í kvittanum at geva skarvin yvir.

HB fekk sítt útjavnandi mál, eftir at Sjúrður Ellefsen hevði framt eitt púra óneyðugt brot inni í brotsteiginum. Í einum luftbólti við Rógva Jacobsen nýtti hann hondina til hjálpar, og dómarin peikaði á brotssparksblettin. Hetta var ein sera býtt gerð, tí vandin var ikki so stórur, at neyðugt var at nýta hondina. Vágamenn vildu vera við, at bólturin var uttanfyri brotsteigin, tá Sjúrður nýtti hondina, men hetta metti dómarin ikki.

Rógvi skeyt sjálvur brotssparkið. Hann sendi Jákup Joensen annan vegin og setti síðani bóltin í hina síðuna.

Tríggjar minuttir seinni fekk HB sigursmálið, og lagnunnar speisemi vildi tað soleiðis, at tað var ein vágamaður, sum fekk tað vinnandi málið.

HB fekk eitt fríspark stutt uttanfyri brotsteigin, sum Tór-Ingar Akselsen tók sær av. Hann langaði til, og skotið fór uppum verjugarðin og sat dygst uppi við samankomingina.

Vágamenn fingu sum vátan vøtt frammaná, tí hóast FS Vágar hevði yvirvág í seinna hálvleiki, so var tað kortini HB, sum fór við sigrinum. Sagt verður úr Vágunum, at hetta var tað besta spælið, sum FS Vágar hevði víst í ár, men úrtøkan var kortini eingin.

FS Vágar hevur framvegis ongan heimdyst vunnið, og vágamenn tykjast at vera gandaðir á heimavølli. Í síðsta dysti ímóti NSÍ spældi FS Vágar eisini væl og brendi enntá eitt brotsspark. Eydnan er eftir øllum at døma ikki við teimum, tá teir spæla á egnum vølli.

Eingin ivi er um, at hesin sigurin hevur stóran týdning fyri HB, tí teir eru framvegis beint í hølunum á grannunum úr B36. HB hevur tveir teir seinastu dystirnar víst góðar dygdir, tí hóast liðið ikki hevur spælt upp til sítt besta, og nakrir av teimum bestu hava sitið uttanfyri, so hevur tað eydnast at fáa trý stig burturúr tveimum sera torførum útidystum í Klaksvík og Miðvági.

**FS Vágar - HB 2-3 (0-1)**
0-1: Bjarni Jørgensen
1-1: Clayton Soares
2-1: Kim Poulsen
2-2: Rógvi Jacobsen, br.
2-3: Tór-Ingar Akselsen
**FS Vágar:** Jákup Joensen - Bjarni Prior, Jóhannus Joensen, Albert Ari Thomassen, Vladlens Osipovs - Jens Erik Rasmussen, Rói Árting, Ruslan Screlea, Sjúrður Ellefsen - Clayton Soares, Kim Poulsen (Birgir Joensen)
**HB:** Poul Næs Joensen - Hans á Lag, Jan C. Dam, Símun Eliasen, Janus Joensen - Eli Thorsteinsson, Rúni Nolsøe, Nicu Dogaru - Rógvi Jacobsen, Bjarni Jørgensen (Páll F. Joensen), Tór-Ingar Akselsen

## FS Vágar fer á venjingarlegu

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Tann 16. juli fer hópurin hjá FS Vágum til Íslands á venjingarlegu. Ferðin varar í eina viku, og liðið skal spæla tveir venjingardystir.

Tann eini verður ímóti einum samansettum eyka- og unglingaliði hjá Akureyri, og hin verður ímóti samansetta liðnum Leiftur/Dalvík. Leiftur er liðið, har Jens Martin Knudsen, John Petersen, Sámal Joensen, Uni Arge og Jens Erik Rasmussen áður hava spælt. Nú spælir liðið í næstbestu deildini og hevur lagt saman við Dalvík.

FS Vágar er í løtuni í niðurflytingarvanda, og vágamenn vóna, at hópurin verður styrktur av hesi ferðini, so at liðið kann savna sær tey neyðugu stigini eftir summarsteðgin.